KÍ – HB 2-0 (1-0)

# Sigursrøðin heldur fram



**Kvinnuliðið hjá KÍ vann aftur hetta vikuskiftið. Hesuferð vunnu tær 2-0 móti HB, men fleiri høvdu óivað væntað ein størri sigur**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

KÍ hevur enn fult stigatal í fremstu kvinnudeildini. Sunnudagin stóð HB fyri skotum, og KÍ vann dystin 2-0. KÍ hevði at kalla alt spælið, og eingin ivi var um, hvør stýrdi dystinum.

Tó gekk tað sera striltið hjá KÍ at staðfesta sigurin, tí so leingi sum støðan bara var 1-0, so kundi HB altíð fáa útjavnandi málið.

Tað var Malena Josephsen, sum legði KÍ á odda eftir tjúgu minuttir. Hon fekk eina sending frá Rannvá Andreasen, og hon gjørdist leys við málverjanum, sum kom út ímóti. Malena var fyrst á bóltinum og sendi framvið málverjanum til 1-0. Hetta var eisini støðan í hálvleikinum.

Hóast KÍ hevði alt spælið, og bólturin var á HB hálvuni tað mesta av tíðini, fekk KÍ einki mál afturat. HB verjan stóð stinn og megnaði at halda áleyparunum hjá KÍ í stuttum tjóðri.

## Malena økir

Seinni hálvleikur líktist nógv t í fyrra, har tað er KÍ, ið stýrir dystinum, men hinvegin fær KÍ framvegis ikki tað næsta og avgerandi málið, sum hevði givið HB mønustingin.

Ikki fyrr enn tíggju minuttir eru eftir at spæla fær Malena seinna málið. Hon fær bóltin í vinstra borði í brotsteiginum og dregur framvið tveimum leikarum, áðrenn hon gerst leys við málverjanum, og hon skorar trygt.

HB hevði sum heild lítið at bjóða uppá í álopsspælinum, men tað eydnaðist hinvegin væl at byrgja uppfyri álopinum hjá KÍ. Tá hesi liðini hittust í Havn, vann KÍ heili 9-1, men ein endurtøka av hesum var ongatíð upp á tal.

## 1. deild kvinnur

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 5 | 5 - 0 - 0 | 29 | 2 | 27 | 15 |
| 2 | B36 | 5 | 3 - 0 - 2 | 10 | 6 | 4 | 9 |
| 3 | HB | 6 | 3 - 0 - 3 | 12 | 14 | -2 | 9 |
| 4 | B68 | 6 | 2 - 1 - 3 | 13 | 20 | -7 | 7 |
| 5 | GÍ | 6 | 0 - 1 - 5 | 6 | 28 | -22 | 1 |

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Malena Jospehsen | KÍ | 8 |
| Vivian Rasmussen | KÍ | 8 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 7 |
| Malan á Dunga | HB | 6 |
| Irdi Hansen | B68 | 5 |
| Ása á Neystabø | B36 | 3 |
| Laila Enghamar | B36 | 3 |
| Súsanna Hansen | B36 | 3 |
| Eyðvør Thomsen | HB | 3 |
| Maibritt S. Olsen | B68 | 2 |
| Mary-Ann Isaksen | B68 | 2 |
| Anja Klæmintsdóttir | GÍ | 2 |
| Eyðfríð Kristiansen | HB | 2 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 2 |
| Jensa Sirdal | KÍ | 2 |
| Arnbjørg Danielsen | B36 | 1 |
| Helen á Lakjuni | B68 | 1 |
| Linda Joensen | B68 | 1 |
| Lív Hansen | B68 | 1 |
| Hansa Mikkelsen | GÍ | 1 |
| Heidi Jacobsen | GÍ | 1 |
| Judy Justinussen | GÍ | 1 |
| Ása í Dímun | HB | 1 |
| Gunn Müller | HB | 1 |
| Marian Joensen | KÍ | 1 |
| Sjálvmál | | 2 |

GÍ – B68 1-5 (0-2)

# Tryggur sigur til toftakvinnur

**Eingin ivi var um vinnaran av grannauppgerðini millum GÍ og B68, tá liðini hittust í Gøtu. B68 hevði tamarhaldið og vann dystin 5-1**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Líkt er til at B68 megnar at fylgja við liðunum í oddinum í 1. deild hjá kvinnum. Liðið hevur nú tikið seg framum HB og vunnið seg uppá níggju stig saman við B36.

Liðið spældi á útivølli móti GÍ um vikuskiftið og vann ein sannførandi sigur. Úrslitið var 5-1, eftir at B68 hevði verið frammanfyri 2-0 við steðgin.

Helen á Lakjuni fekk tað fyrsta málið longu eftir tveir minuttir. B68 breyt ígjøgnum í høgru síðu og málverjin kom út ímóti leikaranum, sum ístaðin legði bóltin innfyri til Helen, sum hevði opið mál og bara skuldi skjóta bóltin inn.

Løtu seinni økti Linda Joensen. Hon fekk eina fríspæling frá miðvøllinum, og hon økti til hálv-leiksstøðuna 2-0.

## Fleiri mál og reytt kort

Eftir steðgin helt B68 á, har tær sleptu. Irdi Hansen skoraði tvey mál uppí slag, og báðu ferð slapp hon frá veruni og var leys móti málinum. Seinasta málið skoraði Mary-Ann Isaksen.

Judy Justinussen pyntaði um úrslitið, tá hon skoraði fyri Gí til 5-1, men løtu seinni fekk hon sítt seinna gula kort og harvið tað reyða kortið, eftir at hon hevði sagt eitthvørt við dómaran. Hon fekk eitt gult kort í fyrra hálvleiki, men hon visti ikki av hesum sjálv, tí hon vendi ryggin til dómaran, tá hann hevði tað á lofti.

Eingin ivi var tó um vinnaran av dystinum, og enn heldur kvinnuliðið hjá B68 tørn í landskappingini.



# Turkaland basti vertunum



*Umit Davala fekk einasta málið í dystinum millum Turkaland og vertirnar úr Japan. Turkaland møtir nú Senegal í fjórðingsfinaluni*

*MYND: Reuters*

**Stór sorg er í Japan, eftir at japanska landsliðið tapti 1-0 móti Turkalandi í øðrum umfari í HM-endaspælinum. Umit Davala fekk einasta málið tíðliga í dystinum**

HM
*Stefan í Skorini*

Í oysandi regni druknaðu vónirnar hjá japanarum um ein sess í fjórðingsfinaluni í HM-endaspælinum. Turkaland vann dystin við einum máli móti ongum. Vertirnir úr Japan eru tískil úti av endaspælinum, eftir at liðið heldur óvæntað vann sín bólk.

Turkaland fekk einasta málið í dystinum, og tað kom longu eftir ellivu minuttir. Turkaland fekk hornaspark, og Umit Davala kom at standa púra leysur í brotsteiginum. Hann hevði tí lætt við at skora við høvdinum, og hetta var hansara næsta mál í endaspælinum.

Hóast Japan fekk ein dyggan smeit so tíðliga í dystinum, so helt liðið fram við álopssinnaðum fótbólti. Hetta gav tó ongantíð bonus.

Bestu royndina hevði brasilski áleyparin Alex, sum nú hevur japanskan borgararætt, tá hann sendi eitt fríspark móti málinum. Skotið rakti træverkið, og nærri komu japanar ikki.

Turkaland lat Japan hava bóltin stórar partar av dystinum, men turkiska verjan stóð stinn, og japanska álopið hevði ógvuliga ilt við at skapa nakrar veruligar málmøguleikar.

## Tárini runnu

Japansku spælararnir grótu innarliga eftir dystin, nú teir ikki sleppa at halda fram í hesum HM-endaspælinum.

Tað skal tó sigast, at Japan hevur staðið seg væl. Liðið vann innleiðandi bóltin við at vinna tveir dystir og spæla ein javnt. Fleiri eygleiðarar høvdu als ikki væntað, at Japan fór at koma víðari, men Japan spældi rættiliga sannførandi í fleiri dystum. Eisini stóð japanska liðið fyri undirhaldandi álopsfótbólti. Venjari hjá Japan er fransmaðurin Phillip Troussier, og hann kann sum heild vera errin av sínum monnum, hóast fleiri høvdu væntað, at Japan hevði góðan møguleika at vinna á Turkalandi.

Við sigrinum skrivar turkiska landsliðið søgu, tí liðið hevur ongantíð áður spælt seg fram til fjórðingsfinaluna í einum HM-endaspæli. Turkaland møtir nú Senegal í næsta umfari.

## Máltindurin, HM

| | | |
|---|---|---|
| Ronaldo | Brasilia | 5 |
| Miroslav Klose | Týskland | 5 |
| Rivaldo | Brasilia | 4 |
| Jon Dahl Tomasson | Danmark | 4 |
| Marc Wilmots | Belgia | 3 |
| Robbie Keane | Írland | 3 |
| Christian Vieri | Italia | 3 |
| Pedro Pauleta | Portugal | 3 |
| Papa Bouba Diop | Senagal | 3 |
| Fernando Morientes | Spania | 3 |
| Raul González | Spania | 3 |
| Henrik Larsson | Svøríki | 3 |
| Rónald Gomez | Costa Rica | 2 |
| Junichi Inamoto | Japan | 2 |
| Jared Borgetti | Mexico | 2 |
| Nelson Cuevas | Paraguay | 2 |
| Henri Camara | Senagal | 2 |
| Fernando Hierro | Spania | 2 |
| Hasan Gokhan Sas | Turkaland | 2 |
| Umit Davala | Turkaland | 2 |
| Brian McBride | USA | 2 |
| Landon Donovan | USA | 2 |

## Rennikapping á Eystanstevnu

**Roysnið skipaði fyri rennikapping á Eystanstevnu fríggjakvøldið og úrslitini vóru hesi:**

**Kvinnur 10,5 km**

| Nr. | Navn | Felag/stað | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 | Rigmor N. Arge | Bragdið | 44,27 min |
| 2 | Sólfríð Fjallsbak | Miðvágur | 56,30 min |

**Menn 10,5 km**

| Nr. | Navn | Felag/stað | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 | Bogi Lenvig | Bragdið | 38,33 min |
| 2 | Guttorm Sørensen | Treysti | 39,14 min |
| 3 | Bogi Joensen | Treysti | 39,18 min |

**Gentur -17**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Ester Rasmussen | TB |
| 2 | Malan Højgaard | Toftir |
| 3 | Maria í Skorini Jacobsen | Treysti |

**Dreingir - 17**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Tróndur Kragesteen | Tórshavn |
| 2 | Jóan Karl Joensen | Kollafjørð |

**Gentur -13**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Marin í Dali | TB |
| 2 | Jenny Svabo | Miðvágur |
| 3 | Sólrun Petersen | Kollafjørð |

**Dreingir -13**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Álvur F. Christiansen | Treysti |
| 2 | Robin Jønsson | Nes |
| 3 | Rógvi Larsen | Lamba |

**Gentur -10**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Elsba Dahl Hansen | Runavík |
| 2 | Louisa Østerø | Klaksvík |
| 3 | Vilbjørg Johannesen | Treysti |

**Dreingir -10**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Sigmund Olsen | Hvannasund |
| 2 | Teitur Hansen | Treysti |
| 3 | Búgvi Thomsen | Saltangará |

**Gentur -7**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Jórunn Hansen | Roysnið |
| 2 | Elin Dahl Hansen | Runavík |
| 3 | Anita Davidsen | Runavík |

**Dreingir -7**

| Nr. | Navn | Felag/stað |
|---|---|---|
| 1 | Albert Róin Johannesen | Æðuvík |
| 2 | John Viljam Johannesen | Treystið |
| 3 | Regin Joensen | Tórshavn |

**Menn Masters (føddir í 1956 ella fyrr) 10,5 km**

| Nr. | Navn | Felag/stað | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 | Steindor Hjaltalin | Tórshavn | 46,12 min |
| 2 | Harry Hansen | Roysnið | 47,19 min |